# Nadal vann Austrialian Open



Spaniumaðurin, Rafael Nadal hevur vunnið stóru tenniskappingina, Australian Open í Melbourne í dag. Talan er um fyrsta sigurin hjá Rafael Nadal í Australian Open kappingini. Í finaluni sigraði Rafael Nadal 3-2 á sveisiska Roger Federer. Settúrslitini gjørdust 7-5, 3-6, 7-6, 3-6 og 6-2. Finalan vardi í heilar 4 tímar og 23 minuttir. Rafael Nadal hevur nú vunnið 6 Grand Slam kappingar (t.e. Australian Open, French Open, Wimbledon og US Open). Roger Federer hevur vunnið 13 Grand Slam kappingar. Amerikanski Pete Sampras eigur metið við 14 vunnum Grand Slam kappingum. Rafael Nadal er tó bert 22 ára gamal, og heldur hann gongdini, so er sannlíkt, at hann fer at taka metið hjá Pete Sampras.

# Sylla og Páll á talvuna

Ahmed Davy Sylla og Páll Klettskarð skutu hvør sítt mál, tá FC Amager í venjingardysti vann 5-0 á Kastrup. Kastrup spælir í Danmarkarrøðini, og sambært heimasíðuni hjá FC Amager var styrkismunurin á liðunum stórur. Sylla var í álopinum frá byrjan, og hann skoraði til 2-0 tíðliga í dystinum. Eftir steðgin kom Erling Jacobsen inn á bakkplássið og Páll Klettskarð kom í álopið, og teir báðir gjørdu góða reklamu fyri sær sjálvum. Páll kom enntá á máltalvuna, tá hann einsamallur við mávlerjanum økti til 5-0 fimm minuttir undan leikloki.



*Mest málríka uppgerðin í Atlantic Airways-kappingini í ár skal spælast umaftur, um tað stendur til Kappingarnevndina hjá HSF*

# Skulu spæla umaftur

**Kappingarnevndin hjá Hondbóltssambandinum hevur gjørt av, at dysturin millum Neistan og VÍF tann 18. januar skal spælast umaftur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um oddadyst, tá liðini hittust í høllini í Hálsi og Havn, og úrslitið gjørdist tað mest málríka í hesum kappingarárinum.

38-37 gjørdist endaliga støðan, men tað, sum fekk øði í vestmenningar var ein hending beint undan steðginum. VÍF hevði tríggjametra kast, tá tvey sekund vóru eftir, og Sámal Joensen royndi seg við beinleiðis skoti.

Dómararnir blástu tó tíðini ígongd alt fyri eitt, og tí ljóðaði lúðurin, samstundis sum skotið frá Sámali Joensen fór í meskarnar.

Dómararnir gjørdu tá av, at málið ikki skuldi telja við, og tí vóru vestmenningar heldur skakkir, tá teir eftir steðgin komu eftir, at teir ikki høvdu eins nógv mál, sum teir hildu seg hava.

Við tepra tapinum í huga gjørdi VÍF tí av at kæra dómaraavgerðina, og hesum fingu teir í gjárkvøldið viðhald í.

» Vísandi til, at dómararnir í sambandi við fríkastið, ið varð dømt beint fyri hálvleik, tóku eina skeiva avgerð við ikki at lata VÍF taka fríkastið umaftur, og tað vísandi til úrslitið í dystinum ikki kann avvísast, at hendan skeiva avgerðin hevur havt avgerandi týdning fyri úrslitið á dystinum, hevur Kappingarnevndin avgjørt at geva VÍF viðhald í klagu síni, soleiðis at úrslitið á dysti nr. A134 millum Neistan og VÍF, tann 18. januar 2009 verður ógildað, og dysturin verður spældur av nýggjum«, skrivar Kappingarnevndin í sínum úrskurði.

Kjartan Thomassen, formaður í Neistanum, sigur, at nevndin ikki hevur verið savnað, síðani tey í gjárkvøldið fingu úrskurðin, og at tey tí ikki hava gjørt av, um avgerðin verður kærd.

# Prinsip-avgerð

**Talan er um óvanliga avgerð, nú Kappingarnevndin hevur gjørt av at broyta dómarans meting**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Uttan at taka dagar ímillum, um úrskurðurin hjá Kappingarnevndini er rættur ella skeivur, kann í øllum førum staðfestast, at talan er um ein sera óvanligan av slagnum.

Tað kann væl vera, at reglugerðirnar fyri Kappingarnevndina hjá HSF ikki beinleiðis nevna tað, men fordømi í líknandi kærum áseta púrasta greitt, at dómarans meting ikki er nakað, sum verður broytt av kappingarnevndini.

Orðingin er eisini beinleiðis ásett í reglugerðini fyri Dómsnevndir innan ÍSF, har tað verður positivt nevnt, at Dómsnevndin ikki hevur heimild at broyta dómarans meting í dysti.

Tí er rættiliga sannlíkt, at Neistin fær viðhald, um avgerðin hjá Kappingarnevndini verður kærd fyri Dómsnevndina.

Tað er tó ikki ókent, at avgerðir av hesum slag kunnu broytast, soleiðis at nýggjur dystur verður ásettur. Fordømi um hetta kunnu millum annað finnast í donskum hondbólti, men tá er tað ovasti kærumyndugleikin, sum hevur skapt fordømi. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað helst verður soleiðis, at kæran frá VÍF skal allan vegin upp til Ítróttadómstólin, áðrenn nøkur endalig niðurstøða fyriliggur í málinum.

